# Skal eisini haldast

– Ein kirkjugarður skal sjálvandi haldast sum so mangt annað, sigur gravarin, Børge Lamhauge. Ein av hansara uppgávum er at halda kirkjugarðin við Glyvra kirkju.

Nú veðrið er av tí allar besta, henda mikudagin í farnu viku, var Børge farin í holt við eina av dagsins uppgávum longu frá morgunstundini.

Ein av mongu grasblettunum í kirkjugarðinum skal sláast enn einaferð.

– Líkt er til, at grasið vekur væl í ár, hóast kuldan sum hevur verið, sigur Børge Lamhauge.

Hann hevur eisini ábyrgdina av kirkjugørðunum í Rituvík og í Oyndarfirði.

**Lættari**

At halda ein kirkjugarð umfatar ikki bert tað at sláa grasið. Sum gravari her á Glyvrum hevur Børge eisini aðrar uppgávur.

Ein onnur uppgáva er at gera gravirnar klárar í samband við jarðarferð.

Hvussu nógvar gravir ið verða grivnar um árið, er sjálvandi ójavnt. Men okkurt árið hava teir grivið 25 gravir íalt í teimum trimum kirkjugørðunum á Glyvrum, Oyndarfirði og Rituvík.

Fyrr tók tað sína tíð, tí tá varð tað gjørt við spaka og handamegi.

– Í dag hava vit eina gravimaskinu, so nú gongur tað nógv lættari, sigur Børge Lamhauge.



*Við sláimaskinuni gongur tað bæði skjótt og væl at sláa grasið í kirkjugarðinum á Glyvrum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




BAKKAFROST YNSKIR ØLLUM
**EINA GÓÐA EYSTANSTEVNU**

Bakkafrost er størsta alifelag í Føroyum. Samanborið við bestu útlendsku alifeløgini hevur Bakkafrost ein góðan og sunnan rakstur, ið kastar væl av sær. Í heimshøpi liggur Bakkafrost millum tey størstu feløgini mált eftir framleiðslunøgd. Hesa støðu ætlar Bakkafrost at halda fast í, og ætlar sær at vaksa, tá ið høvið býðst.

Bakkafrost hevur aliloyvir á 15 støðum, rekur fimm smoltstøðir, og hevur tvey sláturvirkir. Framleiðslan av liðugtvøru liggur á Glyvrum, har ið Bakkafrost eisini hevur sína høvuðsskrivstovu.

Bakkafrost leggur dent á lívfrøðiliga trygd, dugnalig starvsfólk, lágkostnaðarframleiðslu, virðisøking og vakstrarmøguleikar.

Bakkafrost varð skrásett á Oslo Børs í mars 2010.

sansir.fo

Bakkavegur 9 · FO-625 Glyvrar · Faroe Islands · Tel +298 40 50 00 · Fax +298 40 50 09
bakkafrost@bakkafrost.com · www.bakkafrost.com

BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968